Jan Højgaard <jan@fiskimannafelag.fo>
Sendt: 26. oktober 2023 13:01
Til: Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>
Emne: Sjórættur

Til Løgmansskivstovuna

Víst verður til skriv tykkara um uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (yvirtøka av málsøkinum sjórættur)

Føroya Fiskimannafelag hevur onga viðmerking til innihaldið í lógaruppskotinum.

Í sambandi við at talan er um yvirtøku av einum málsøki til føroyskar myndugleikar at lóggeva um, fyrisita og fíggja, so er umráðandi, at fiskivinna og sjófólk ikki á nakran hátt verða verri fyri orsakað av yvirtøkuni.

Ein avgjørd fyritreyt fyri slíkari yvirtøku er tí, at myndugleikarnir áhaldandi taka fulla ábyrgd av at hava lógarverkið nøktandi dagført, at neyðuga fyrisitingarliga orkan verður sett av nú og í framtíðini, eins og neyðug fíggjarlig orka eisini má setast av nú og í framtíðini, soleiðis at vit eftir eina yvirtøku av málsøkinum ikki á nakran hátt seta føroyska sjóvinnu ella sjófólk í verri støðu orsakað av yvirtøkuni.

Tí má vissa frammanundan fáast fyri, at neyðugu førleikarnir eru til at fyrisita økið, at neyðuga játtanin verður fingin, soleiðis at bæði fyrisitingarligi parturin, lóggevandi parturin og onnur viðurskifti í mun til samstarv við grannalond og altjóða felagsskapir v.m. kann verða røkt á einum nøktandi støði. Á sama hátt er avgerandi fyri at seta slíka yvirtøku í verk, at landsstýrið kann veita vissu fyri, at Føroyar t.d. kunnu varðveita og framhaldandi fáa EMO góðkenningar, sum eru neyðugar.

Vegna Føroya Fiskimannafelag

Jan Højgaard, formaður

Jan Højgaard
Privatlívspolitikkur (fiskimannafelag.fo)